# SkeiðsDepilin
– So fært tú neyðuga førleikan

Skeiðsdepilin arbeiðir við eftir- og víðariútbúgving á Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla. Vit vilja geva tær neyðuga førleikan at fremja tey verk, sum tú hevur sett tær fyri.

sd.fo

SkeiðsDepilin | Marknagilsvegur 75 | postboks 3239 | FO-110 Tórshavn | tel 318813 | fax 313374 | info@sd.fo



## Grundskeið í sveising byrjar 15. mars 2010

**MÁLBÓLKUR**
Skeiðið er ætlað at hjálpa einstaklingum at nøkta grundleggjandi krøv til førleika í vinnuni. Eitt grundskeið í sveising er ein sera góð barlast til at bøta um møguleikarnar hjá tí einstaka luttakaranum at fáa eitt nú læru-pláss í einhvørjari smiðju, víðari útbúgving ella arbeiði.

**ENDAMÁL**
Skeiðið miðar ímóti at gera luttakaran føran fyri at gera grundleggjandi arbeiðsuppgávur á rættan fakligan hátt og við atliti til trygd og umhvørvi. Arbeitt verður við flammuskering og nýtslu av tólum til einfaldar sveisiuppgávur.

Støðið er nakað tað sama, sum tað ið bilsmiðlærlingar læra fyrsta læruárið.

**INNIHALD**
Skeiðið varar 72 tímar yvir 2 vikur. Undirvísingin er bæði ástøðilig og verklig, tó mest verklig. Skeiðið inniheldur:

- trygd innan sveising
- gasssveising
- flammuskering
- tig-sveising
- mag-sveising
- elektrodusveising

**TÍÐARSKEIÐ:** 15. – 26. mars 2010 frá kl. 08.10-15.25, tó fríggjadag kl. 08.10-12.00

**STAÐ:** Tekniski Skúli í Smiðjugerði

**KOSTNAÐUR:** Kr. 17.500,-

**UNDIRVÍSARIR:** Frá Tekniska Skúla: Bjarni Olsen, deildarleiðari og Jeffri Olsen, lærari

**TILMELDINGARFREIST:** 8. mars 2010, ella so leingi pláss er

**Tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni www.sd.fo**

# Løgfrøðingur og skrivstovulærlingur til Føroya Kærustovn

**Vit hava fingið nýggjar uppgávur og hava brúk fyri einum løgfrøðingi og einum skrivstovulærlingi.**

**Løgfrøðingurin**
Arbeiði fevnir í høvuðsheitunum um at lýsa og viðgera kærur frá borgarum og fyritøkum, at gera kærunevndunum tilmæli um avgerð, at hava samskifti við kærarar og stovnar innan kæruøki og at luttaka í gerð av ársfrágreiðingum, avgerðarsøvnum og vegleiðingum til stovnar og borgaran

Vit bjóða spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga. Talan er um sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi og góðar skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar

Tú hevur løgfrøðiliga útbúgving og dugir at arbeiða sjálvstøðugt og saman við øðrum um størri arbeiðsuppgávur. Lesandi, sum eru um at vera liðug við lesnaðin, eru eisini vælkomin at søkja.

Løn- og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Starvið verður at seta frá 1. apríl ella eftir avtalu. Talan er um parttíðarstarv, svarandi til 60% av fullari tíð fram til 1. september 2010, tá møguleiki er fyri at fara upp á fulla tíð.

**Skrivstovulærlingurin**
Talan er um eitt gott og fjølbroytt lærupláss innan almenna fyrisiting. Umframt vanligt skrivstovuarbeiði við telefon- og viðskiftaavgreiðslu, skjalaskráseting og málsviðgerð, fevnir arbeiði eisini um kærufundaravgreiðslur og bókhald.

Tú hevur HF-, HH- ella studentsprógv, góðan málsligan kunnleika og dugir væl at brúka teldu.

Løn- og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið verður at seta frá 1. apríl ella eftir avtalu.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 3. mars 2010. Áhugaði eru vælkomin at seta seg í samband við Anju Hovgaard, stjóra ella Peturbjørg Jensen, deildarleiðara fyri at frætta nærri um størvini.

**Føroya Kærustovnur**
Undir Hornabakka · Postsmoga 45 · 110 Tórshavn · Tel 32 05 85
Fax 32 05 90 · teldupostur: kaerustovnur@kaerustovnur.fo

**Um stovnin:** Føroya Kærustovnur er óheftur stovnur undir Innlendismálaráðnum. Stovnurin fyrireikar kærumál til Kærunevndina í almanna- og heilsumálum, Skatta- og avgjaldskærunevndina, Kærunevndina hjá Stuðulsstovninum, Kærunevndina í Lendismálum, Vinnukærunevndina og Psykiatrisku Sjúklingakærunevndina. Harumframt er Kærustovnurin skrivstova hjá Skuldarumskipanarnevndini og Fjølmiðlanevndini. Á stovninum starvast í løtuni 7 fólk, stjórin, tríggir løgfrøðingar og trý skrivstovufólk.

www.parykkar.fo
...hár alt lívið

Salong Fríðgerð





Nú ber til at fara inn á **www.parykkar.fo** og síggja ymiskar møguleikar, um tygum hava tunt ella einki hár.



**CLAUS OG HENNING TOFTHILD**
kema til Føroya fyri seinastu ferð og eru at hitta á salongini 7. mars.

Ring og fá tíð á 311545 ella 511545

Salong Fríðgerð · Niðaragøta 52 · 188 Hoyvík · Tel. 51 15 45